Samgongan ásannar:

# Vandi fyri at vit missa tamarhaldið

**Tað eru so nógv mál løgd fyri Løgtingið, at tað er ómøguligt at fremja tey, nú so stutt er eftir til val. Tí fer samgongan nú undir eitt heilt óvanligt stig**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hava atfinningarnar heglað niðuryvir samgonguna.

Sagt verður, at arbeiðið í Løgtinginum er merkt av ruðuleika, tí hóast tað eru minni enn tveir mánaðir eftir til val, hevur Løgtingið eina ørgrynnu av málum, sum ikki hevur avgreidd.

Val verður útskrivað í seinasta lagi á jólum og eftir tað, verður ikki tann stóra, politiska viðgerðin. Sostatt hevur Løgtingið í besta føri ein góðan mánað eftir at virka í.

Hinvegin hevur samgongan runt roknað eini 50 mál, sum hon hevur lagt fyri Løgtingið og sum ikki eru avgreidd enn. Harímillum eru stórmál sum fíggjarlógin og bústaðarpakkin.

Harafturat hevur andstøðan lagt eini 20 mál fyri Løgtingið, sum ikki eru avgreidd og oman á alt liggja einir 30 skrivligir fyrispurningar í Løgtinginum, sum heldur ikki eru avgreiddir.

Sostatt er greitt, at Løgtingið fær hendurnar fullar og meiri enn tað, hesa tíðina, sum er eftir av valskeiðnum.

### Taka í egnan barm

Og nú tekur samgongan í egnan barm og viðurkennur, at hon er við at missa fótafestið.

Á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygardagin ásannaði floksformaðurin, Jørgen Niclasen, at tey hava ikki yvirlit yvir støðuna.

- Vit hava viðurkent, at hetta ber ikki til, segði Jørgen Niclasen.

Hann staðfestir, at Løgtingið hevur í besta føri nakrar fáar vikur eftir at arbeiða í.

- Samstundis liggja eini 100 mál og fyrispurningar í Løgtinginum, sum ikki eru avgreidd og tey flestu málini føra útreiðslur við sær fyri landskassan.

Tí hevur samgongan avtalað, at næstu dagarnir fer hon at seta seg saman at viðgera støðuna.

- Vit hava avtala at seta okkum niður at sortera øll tey mál, sum eru løgd fyri Løgtingið.

Sostatt hevur samgongan avtalað at fara undir tað heilt óvanliga stigið at sortera hvørji mál, sum hon sjálv hevur lagt fyri Løgtingið, skulu fremjast og, hvørji skulu í ruskspannuna.

- Vit hava avtalað at seta okkum niður í samgonguni at finna útav, hvat vit fáa framt av ætlaða politikkinum og, hvat vit ikki fáa gjøgnumført.

- Tað ber ikki til at sleppa øllum leyst, staðfesti Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at tað er umráðandi, at vit eisini vakna eftir valið og hava eitt virkisført løgting og ikki ein landskassa í skeljasori.

Hann ásannaði, at tað er neyðugt, at arbeiða politiskt, men tað er eisini neyðugt at ansa eftir útreiðslunum.



*Fólkið á landsfundi í Fólkaflokkinum hoyrdi formannin ásannað, at samgongan er við at missa yvirlitið yvir politisku støðuna og tað tvingar samgonguna at taka heilt óvanligt stig*



*Ein hugsunnarsamur Jógvan á Lakjuni á landsfundi Fólkafloksins leygardagin. Hann vil hava eina greiða fráboðan frá Fòlkaflokkinum um, hvørja støðu flokkurin hevur til skrásett parlag. Annars hevur hann lítlan hug at vera við meir, kunngjkørdi hann á landsfundinum*

# Jógvan á Lakjuni veit ikki um hann tímir meir

**Jógvan á Lakjuni vil hava sín egna flokk at koma við eini greiði fráboðan um skrásett parlag. Annars hevur hann lítlan hug at vera í Fólkaflokkinum longur**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður fyri fólkaflokkin hevur framvegis rættiliga ilt í sálini av umstrídda málinum um 266-b.

Og á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygardagin staðfesti hann, at tað kann saktans koma har til, at hann ikki er sinnaður at halda fram í Fólkaflokkinum.

Hann segði, at hetta snýr seg um, hvørji virði, flokkurin skal byggja á og, hvørvi virði, samfelagið skal byggja á.

- Eru vit samd um, at samfelagið skal byggja á kristnu lívsvirðini, so skulu vit halda okkum til kristnu lívsvirðini.

Jógvan á Lakjuni staðfesti eisini, at tað ger honum framvegis rættiliga ilt av, at ein partur av Fólkaflokkinum hjálpti til at fáa grein 266-b samtykt í Løgtinginum.

Samstundis ásannaði hann, at hetta málið er farið.

Hinvegin var hann eisini sannførdur um, at 266-b bara var eitt stig á leiðini og at hetta fer at føra meiri við sær.

Í hesum sambandi ivaðist hann ikki í, at tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn uppskot kemur fram um at loyva skrásettum parlagi.

- Tað er heilt týðiligt, at eitt mál, sum 226-b flytir atkvøður og hann spurdi um ein orsøk kann vera, at flokkurin hevur eina ov ullinta støðu til hesi viðurskiftini.

Hann spurdi um hetta kundi vera orsøkin til, at fólkaflokkurin hevði mist atkvøður so nógvar atkvøður til Miðflokkin.

Jógvan á Lakjuni segði, at í hesum sambandi má Fólkaflokkurin gera sær greitt, hvørjum hann stendur fyri á hesum øki.

- Vit vera noydd at seta nøkur mørk, tá ið tað kemur til tey etisku virðini og vit eiga at boða greitt frá, at Fólkaflokkurin er ímóti skrásettum parlagi.

Og hann legði afturat, at tann, sum ikki tekur undir við eini slíkari fráboðan, eigur rætt og slætt ikki at stilla upp fyri Fólkaflokkin.

Hann staðfesti eisini, at vit eiga ikki at blanda kristindóm og politikk saman, men tað, vit standa fyri, tað standa vit fyri og byggja vit á kristnu virðini, eiga vit at tora at siga tað og at standa við tað.

- Vit eiga at hava eina greiða meining um alskyns viðurskifti, men vit eiga at hava eina greiða meining og vit eiga at vera samd um okkara støðu.

Jógvan á Lakjuni segði, at endar tað við, at hann stillar upp aftur, vil hann fegin hava, at hann kann boða frá í valstríðnum, at Fólkaflokkurin er ímóti skrásettum parlagi.

- Eg vil gjarna heita á Fólkaflokkin um at vit taka greiða støðu í hesum máli, annars havi eg lítlan hug at vera við, staðfesti landsstýrismaðurin fyri Fólkaflokkin.

Hann staðfesti kortini, at hetta var ikki fyri at vera ímóti nøkrum samfelagsbólkum.

Jógvan á Lakjuni nevndi eisini spurningin um fría fosturtøku sum eitt etiskt mál, sum flokkurin eigur at hava eina greiða støðu til ístaðin fyri at halta til báðar síður, akkurát sum í málinum um 226-b.

### Ganga neyvan Jógvani á møti

Hinvegin er onki, sum bendir á, at Jógvan á Lakjuni fær eina slíka greiða fráboðan frá Fólkaflokkinum.

Ein fundarmaður førdi fram, at tað kann eisini styggja ungar veljara burtur at taka so harðliga frástøðu frá 226-b, tí tey ungu fylgja við tíðini. Og tað kann ikki vera Fólkafloksins politikkur, at tað ikki skal vera rúmd fyri samkyndum í Føroyum, tí vit hava brúk fyri øllum.

- Tað skal vera pláss í Fólkaflokkinum til at hava ymsar áskoðanir um hasi viðurskiftini, tí her skal vera rúmd fyri øllum meiningum.

Formaður Fólkafloksins, Jørgen Niclasen, ásannaði, at tingbólkurin hevði tikið ta støðu, at hann var ímóti at seta 226-b í revsilógina.

- Men í politikki er tað so, at ein løgtingsmaður hevur bara seg sjálvan og sína egnu sannføring at standa til svars fyri. Tí ber ikki til at tvinga løgtingslimir at taka eina ávísa støðu. Tað hava vit rætt og slætt ikki rætt til, staðfesti Jørgen Niclasen.

Sjálvur er hann ímóti skrásettum parlagi, men í Fólkaflokkinum er tað sum í hinum størri flokkunum, at í etiskum málum er tað hvør einstakur tinglimur, sum atkvøður eftir síni egnu sannføring.

Men nú vit fyrireika valið, eigur greiða at fáast á slík viðurskifti fyri valið, tí eftir valið stendur tað til samvitskuna hjá hvørjum tinglimi, hvussu atkvøtt verður.